UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **28. juni 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-11**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-167/2020 eftir Tingskipanini §52 a frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu, um eftirmeting av læraraútbúgvingini, settur landsstýrismanninum, Jenis av Rana (eftir § 52a í Tingskipanini)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu gongst við arbeiðinum at eftirmeta læraraútbúgvingina og nær kann væntast, at hetta verður liðugt?

Svar

Til 1: Arbeiðssetningur fyri eftirmetingina er liðugt orðaður, og uttanhýsis serfrøðingabólkur er við at verða mannaður.

Serfrøðingabólkurin fer til verka beint eftir summarfrítíðina, og kemur væntandi at halda fram til vit nærkast sumri í 2022. Tá handar serfrøðingabólkurin eina skriftliga frágreiðing, har niðurstøður og tilmæli framganga frá eftirmetingini.

Tað er tó vert at viðmerkja, at arbeiðið við eftirmetingini ikki er ein serstøk eftirmeting av læraraútbúgvingini burturav, men at talan er um eina eftirmeting av Fróðskaparsetri Føroya, har serligt atlit verður tikið til Námsvísindadeildina, har undir læraraútbúgvingina og námsfrøðiútbúgvingina, v.m.

Í viðmerkingum til spurningin verður sagt, at læraraútbúgvingin hevur alstóran týdning fyri fólkaskúlan, sum er ein av grundsúlunum í samfelagnum, og er fortreyt fyri framtíðina hjá børnum okkara og tí eisini samfelagnum øllum. Eg eri samdur í hesum, men vil leggja afturat, at eisini námsfrøðiútbúgvingin hevur alstóran týdning, og er somuleiðis ein av grundsúlunum í samfelagnum.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður